**Frágreiðing frá nevndini, sum ger tilmæli til Norðurlendsku Bókmentavirðislønina - 2008**

Virksemi í nevndini er stórt sæð tað sama ár um ár. Limirnir samskifta fyrst leysliga um nýggju føroysku útgávurnar og hittast síðani til fundar einar tvær ferðir. Tað mesta av tí praktiska arbeiðinum í nevndini, t.v.s. við at fáa verkið, sum er í uppskoti, týtt, prenta o.s.fr., liggur á formanninum, sum eisini fer á norðurlendska fundin.

Í fjør segði Turið Sigurðardóttir seg úr nevndini og fyri hana varð vald Ann Ellefsen. Nevndin skipaði seg av nýggjum stutt eftir við Bergi Djurhuus Hansen sum formanni.

Í august gjørdi nevndin av at skjóta upp yrkingasavnið "September í bjørkum sum kanska eru bláar" eftir Carl Jóhan Jensen til Norðurlendsku Bókmentavirðislønina. Heitt varð á Erik Skyum-Nielsen um at týða, og týðingin var klár miðskeiðis í desember ("September i birke som måske er blå"). Norðurlendski fundurin var í Stokkholm 28. og 29. februar, og sum kunnugt varð avgjørt at lata donsku Naja Marie Aidt virðislønina fyri stuttsøgusavnið "Bavian".

Norðurlendski fundurin komandi ár verður í Keypmannhavn, og í Stokkholm varð tosað eitt sindur um at skipa fyri serligum tiltaki í hesum sambandi fyri at varpa ljós á smáu bókmentaøkini í Norðurlondum. Eingin samtykt varð gjørd, men kanska verður okkurt at frætta innan alt ov langa tíð.

Í mars 2008 segði Guðrun Gaard seg úr nevndini, og fyri hana varð vald Kinna Poulsen. Nevndin er nú farin undir at viðgera, hvat skal verða føroyska uppskotið til Norðurlendsku Bókmentavirðislønina í 2009.

Tórshavn 25/3-2008

Bergur Djurhuus Hansen
formaður